B68-ÍF 2-0 (1-0)

# Anderson heldur toftamonnum uppi

**Brasilski Anderson var munurin á liðunum, tá hann við tveimum perlum syrgdi fyri, at øll stigini vórðu verandi á Svangaskarði sunnudagin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hann er kanska ikki gull verdur, men minni kann eisini tað. Brasilski Anderson hevur víst seg sum sannan fong hjá toftamonnum, síðani hann í summarsteðginum kom til landið, og tað er heldur einki at ivast í, at toftafólk hava tikið hann til sín.

Hóast áskoðararnir kring Svangaskarð ikki rúgva so nógv upp í løtuni, so var taktfasta rópið ikki at fara skeivur av, tá Trygvi Mortensen valdi at geva dagsins manni frí teir seinastu minuttirnar av dystinum móti ÍF. Ein dyst, sum B68 vann 2-0, soleiðis at toftamenn nú framvegis hava eina vón um, at tað skal bera til at vinna seg undan niðurflytingini.



*Kanska er hann ikki gull verdur, men brasilisanski Anderson tykist í øllum førum vera maðurin, sum skal toga B68 av botnsessinum, har toftamenn hava hildið til alt árið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Gestirnir hóttu

Dysturin á Toftum var nú ikki av teimum bestu leikliga sæð, men spenta støðan undan dystinnum syrgdi alla tíðina fyri, at nervin var til staðar.

Fyrstu longu løtuna bendi annars á, at tað vóru vertirnir, sum vóru meira fjáltursstungnir enn gestirnir. Fram eftir vøllinum vildi lítið og einki bera til, og heldur ikki í verjupartinum tóktist liðið vera serliga sannførandi.

Fuglfirðingar hinvegin tóktust uppsettir uppá, at niðurflytingarstríðið í øllum førum ikki skal vera nakað, sum skal bíða eftir eini avgerð til seinasta umfar. Fleiri ferðir megnaðu teir hegnisliga at spæla ígjøgnum í borðunum, og tó at talan ikki gjørdist um opnar møguleikar, so lúrdi eitt mál til gestirnar onkra staðni í sjónarringinum.

Tað nærmasta, sum gestirnir komu, var tó eitt innlegg, sum Øssur Hansen mundi beint í egið mál, og spakuliga megnaðu vertirnir at flyta spælið longur niðan. Veruligar møguleikar gjørdist talan tó ikki. Hvørki Øssur Hansen ella Stanislav Stankov megnaðu at bróta ígjøgnum í borðunum, og mitt fyri komu kreativu evnini hjá Eyðstein Skipanes og Boga Petersen als ikki til sjóndar.

Talan mátti mest sum gerast um einmansavrik, um toftamenn skuldu fáa nakað burturúr, og tá tørvurin á hesum var størstur, megnaði Anderson eisini at levera vøruna.

Fyrru ferðina hetta hendi, var góðar fimm minuttir undan steðginum. ÍF verjan var annars væl skipað, og vandi tóktist ikki vera á ferð, tá brasiliumaðurin fekk bóltin. Men so kom ferð á. Sum eitt snarljós rykti hann framvið fyrsta manninum. Hoppaði og dansaði fram við næsta, triðja og fjórða manninum, áðrenn hann við høgra beininum meddaði niðri við nærmastu stong, og so var B68 á odda.

## Dreymamál

Sum vera man, so broytti hetta um dystargongdina. Toftamenn kundu nú fyri tað mesta hugsa um at standa rætt í verjupartinum, fyri síðani at dúva upp á kontra, og fyrstu løtuna eftir steðgin hóttu teir eisini fleiri ferðir við at økja.

Fuglfriðingar vóru hinvegin mest sum steinrunnir. Fjálturin á leikarunum var sjónligur, nú teir mest sum stóðu andlit til andlits við niðurflytingarvandanum. Einføldu tingini, sum í fyrra hálvleiki riggaðu so væl, vóru nú mest sum ógjørlig at gjøgnumføra, og heimaáskoðararnir tóktust bara gerast alt meira álvuligir um støðuna.

Sjálvt ikki tann sannroynd, at ein smáskaddur Øssur Hansen mátti fara av vøllinum, tóktist broyta nakað um leikgongdina í spælinum, og tá Anderson so gandaði fyri aðru ferð, var leyst og liðugt. Staddur uttarliga í høgra borðið - einar 25-30 metrar úr málinum – meddaði brasiliumaðurin til fyrstu ferð, tá fuglfirðingar ikki fingu skallað ordiliga burtur. Bólturin ferðaðist í einum vøkrum boga. Fyrst himmalhøgt fyri síðani at skrúva hegnisliga niður við handara stólpa, uttan at Karstin í ÍF málinum fekk gjørt tað allar minsta, til tess at verja fyri. Eitt framúr væl skotið mál, sum uttan iva man teljast millum heitastu kandidatarnar, um menn skulu kjakast um, hvat mál man vera tað vakrasta hetta fótbóltsárið.

## Einki er avgjørt

Og so var ikki stórt meira at gera hjá ÍF. Teir royndu seinastu løtuna at flyta nógv fólk fram í álopi, men veruligar møguleikar gjørdist talan sjáldan um, og sera symptomatiskt, so megnaði Sylla bert at prika framvið stólpanum, tá hann í yvirtíðini varð sendur avstað móti málinum.

Meira enn eitt einsamalt troystarmál hevði talan tó ikki verið um, og so kundu toftamenn fegnast, tá Lassin blásti seinasta bríkslið. Enn eru teir ikki leysir av vandanum – langt ífrá – men sigurin gevur teimum trúnna uppá, at tað skal bera til at gera ein »Skála« í sjálvum endaspurtinum.

Hjá fuglfirðingunum er støðan nú nakað øðrvísi. Teir eru framvegis trý stig undan toftamonnum, men hugmyndin eftir dystin sunnudagin segði tað mesta. Niðurboygdu høvdini tóktust mest sum ikki trúgva uppá, at bjargingin longur er ein møguleiki, men tað kann væl vera, at alt sær øðrvísi út næsta sunnudag. Bara eitt stig í teimum báðum seinastu dystunum kann í øllum førum gera undurverk. Og tað vildi tað kanska eisini gjørt, um teir høvdu Anderson á sínum liði, men tann gleðin fall so bara toftamonnum í lut.

## Fakta um dystin

**B68-ÍF 2-0 (1-0)**
1-0: Anderson Cardena, 39
2-0: Anderson Cardena, 61
**B68:** Meinhard Joensen – Ronnie Svalbard, Kári Sigvardsen, Oleif Joensen, Jákup Eli Olsen – Stanislav Stankov (Kristian A. Andreasen, 72.), Eyðstein Skipanes, Bogi Petersen, Øssur Hansen (Øssur Jacobsen, 65.) – Jóan P. Poulsen, Anderson Cardena (Fabricio Borges, 85.)
**GK:** Jákup Eli Olsen, 60

**ÍF:** Karstin Joensen – Áki Petersen, Bartal Eliasen, Rúni Elttør, Fritleif í Lambanum – Eyðolvur Petersen (Gunnar Nielsen, 61.), Hanus Eliasen (Eyðun Ryggshamar, 80.), Høgni Zachariasen (Teitur Joensen, 82.), Høgni Madsen – Sylla D. Amed, Magni á Lakjuni

**Dómari:** ***Lassin Isaksen:*** Hevði alla tíðina gott tak á dystinumj og gott samband við leikararnar. Flott klára, at bert eitt gult kort varð givið, tá týdningurin av dystinum verður havdur í huga.

# Eitt fet í senn



*- Vit leikarar hava í øllum førum alla tíðina verið samdir um, at vit skulu geva okkum alt tað, sum vit eru mentir fyri felagið, sigur Eyðstein Skipanes*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Eyðstein Skipanes heldur framvegis, at hann og liðfelagarnir hava knívin á barkanum**

FÓTBÓLTSPRÁT
*Jákup Mørk*

Toftafólk draga helst andan nakað lættari, eftir at tað annað vikuskiftið á rað eydnaðist leikarunum at fáa fult. Men sjálvir halda leikararnir tó ikki, at teir hava bjargað nøkrum sum helst enn.

- Vit høvdu knívin á barkanum, áðrenn vit fóru til Vágs. Og alt uttan ein sigur í dag hevði viðført, at hálsurin varð kvettur, men enn liva vit so.

Soleiðis helt Eyðstein Skipanes fyri, tá vit eftir dystin fingu orðið á hann.

*Men tað er helst einki at ivast í, at lagið er betri nú, enn tað var fyri tveimum vikum síðani?*

- Tað veit eg ikki. Vit leikarar hava í øllum førum alla tíðina verið samdir um, at vit skulu geva okkum alt tað, sum vit eru mentir fyri felagið. Tann setningin hava vit framvegis.

- Men tað sigur seg tó sjálvt, at tað gerst nakað lættari, nú vit hava vunnið tvær ferðir á rað, men tað í sjálvum sær er ikki nóg mikið, um vit ikki gera arbeiðið liðugt, heldur hann.

Og spurdur, hvørt tað so skal gerast við seks stigum afturat í teimum báðum seinastu dystunum, tykist Eyðstein sera avgjørdur.

- Tað veit eg einki um. Vit taka ein dyst í senn, og so fáa vit at síggja. Beint nú eru eyguni í øllum førum bara vend móti komandi uppgávuni, segði hann at enda.

# Steðgaðu upp



*- Hatta var ein katastrofa hjá okkum, helt Bartal Eliasen eftir dystin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Bartal Eliasen heldur, at fyrra B68-málið at kalla oyðilegði dystin fyri ÍF**

FÓTBÓLTSPRÁT
*Jákup Mørk*

Lagið var ikki av tí besta, tá vit eftir dystin á Svangaskarði fingu orðið á Bartal Eliasen hjá ÍF.

- Hatta var ein katastrofa hjá okkum. Vit hava møguleikarnar fyrra partin av dystinum, men vit megna ikki at umseta hesar til mál, og so fáa vit eitt sovorðið mál ímóti okkum. Tað var kanska gott trekt, men hann ferð altso fram við fýra av okkara monnum, og tá skal onkur vera nóg kaldur til bara at taka hann. Næsta málið er hinvegin ein perla, men tá vóru vit longu uppsteðgaðir.

***Tað sá eisini út til, at tit fóru púrasta niður við nakkanum longu eftir fyrsta málið. Megnaðu tit ikki at tackla mótgongdina?***

- Eg veit ikki. Tað er kanska eisini tað, at vit hava somikið nógvar ungar leikarar á liðnum, og at vit tí gerast ov fjáltursstungnir. Í øllum førum hekk lítið og einki saman hjá okkum eftir hetta, helt Bartal.

Enn eru tó trý stig niður til B68, men hóast hetta, so tykist Bartal ikki hava alt ov ljósar vónir um komandi vikurnar.

- Nú verður tað í øllum førum óluksáliga trupult hjá okkum, og vit mugu í øllum førum vóna, at B68 einki fær burturúr seinastu umførunum. Men líka mikið, hvat og hvussu, so mugu vit ikki hanga við høvdunum ov leingi. Vit mugu stríðast sum ein maður, og so vóna, at tað ber nóg langt, segði verjuálitið hjá ÍF at enda.